**Minnislisti til skrivligar uppgávur og stílar**

Tá ið tú hevur svarað uppgávuni, skalt tú kanna hana og vita, um alt er gott og rætt. Uppgávan er ikki liðug og klár at lata inn, fyrr enn tú hevur kannað alt, sum tú kanst. Minst eisini til at goyma uppgávuna.

**Innihald:**

1. Set punktum og byrja við stórum eftir punktum.
2. Minst til at skriva sernøvn við stórum.
3. Set komma.
4. Rætta stavivillur – brúka rættstavaran í Word ella spyr onkran vaksnan.
5. Les tað, sum tú hevur skrivað, hart fyri tær sjálvum ella einum vaksnum. Lurta um setningarnir ljóða væl. Kanska onkur setningur skal broytast og okkurt punktum ella komma skal setast afturat.
6. Rætta og les hart eina ferð afturat. Lurta væl, um alt ljóðar, sum tað skal. Rætta um tú aftur finnur okkurt.
7. Minstil at stílar skulu ikki hava myndir við.

**Útsjónd:**

1. Skriftin skal vera Times New Roman, stødd 12
2. Set navn, lærugrein og dato í síðuhøvdið ovast
3. Set reglufrástøðu til 1,5
4. Yvirskriftin skal vera stødd 16

Nú er klárt at lata inn.